gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Nýgift og á toppinum



*Karina og Jóhannus Petersen eftir frálíka úrslitið í FM-kappingini í svimjing. Nýgift og sigursharrar*
*Mynd: Øssur Mohr*

**Tvær vikur áðrenn FM í svimjing tók Karina Petersen øll á bóli. Hon ggifti seg og rýmdi av landinum í nakrar dagar. Men hon kom afturíaftur og gjørdist stóri sigursharrin í føroyameistaraskapinum í svimjing seinasta vikuskiftið**

RINGSVIMJING
*Eyðun Klakstein*

Tvær vikur áðrenn føroyameistaraskapin í svimjing tók svimjarin Karina Petersen úr Fuglafirði eitt óvanligt stig.

Hon gifti seg við Jóhannes Petersen úr Gøtu og fór síðani á brúdleypsferð til Skotlands. Hon var burturi frá umráðandi venjing í næstan eina viku, og tá hon kom aftur til landið, var bara ein góð vika eftir til FM í svimjing.

– Vit høvdu tosað um, at eg skuldi eita Petersen, tá eg fór til FM í ár, og stutt frammanundan FM avgjørdu vit at giftast, sigur Karina, sum er betri kend við eftirnavninum Eliasen.

Hon hevur verið millum fremstu svimjararnar í landinum seinastu nógv árini, og hon hevur umboðað Føroyar á tveimum Oyggjaleikum.

## Mátti bíða við tilmeldingini

Venjarin hjá Karinu visti einki um æltaninar hjá svimjaranum, tí alt skuldi haldast loyniligt.

Bara nærmasta familjan fekk at vita um vígsluna, og tá nýgifta parið fór á brúdleypsferð dagin eftir flaggdagin, visti venjarin í Fulgafjarða Svimjifelag av ongum.

– Eg skuldi útfylla ein tilmeldingarseðil til FM-kappingina, og hesum mátti eg bíða við sum longst fyri ikki at avdúka planirnar hjá okkum, sigur Karina.

Eftir nakrar dagar í Skotlandi komu Karina og Jóhannes aftur til Føroya, og Karina fór undir seinasta partin av venjingini til føroyameistaraskapin.

– Eg var einasti luttakarin fyri Fuglafjarða Svimjifelag, og tí vildi eg fegin hava eitt gott úrslit. Eg hugsaði ikki um Oyggjaleikatíðir, men bara um at vinna eitt gullheiðursmerki, sigur Karina.

## Gull til mannin

Karina Petersen svam ikki í fjør, men í vetur hevur hon stríðst við at koma í røttu venjingina aftur.

– Eg helt, at hon skuldi fara at svimja aftur, og tað eydnaðist at yvirtala hana, sigur Jóhannus.

Tá Karina var farin undir venjingina aftur, vóru boð eftir henni til landsliðið, men her gav hon avboð. Hon hugsaði ikki um landsliðið í fyrstu syftu, men meiri um at koma á tað støði, sum hon hevði verið á.

Karina hevur tikið venjingina í stórum álvara, og umframt sjálva svimjivenjingina hevur hon eisini runnið og havt styrkisvenjing.

– Eg fór til FM fyri at luttaka í so nógvum kappingum sum gjørligt. Eg vildi sjálvandi hava eitt so gott úrslit sum gjørligt, men stóra málið var at vinna eitt gullmerki til mannin, sigur Karina.

Og gull fekk maðurin.

Tí tá FM-kappingin var av, var Karina mest vinnandi svimjarin. Hon vann fimm gullmerki, fýra silvur og eina bronsu.

– Eg vann fyrsta gullið longu fyrsta kvøldið, so tað gekk óvæntað væl. Eg hevði ikki droymt um, at eg skuldi vinna fimm gull, sigur Karina.

## Eingir Oyggjaleikir

Vanligt er ikki, at fremstu svimjararnir taka lut í so nógvum kappingum til FM. Heldur leggja teir seg eftir færri kappingum, fyri at fáa so góða tíð sum gjørligt. Tað er ikki talið á gullmerkjum ella serliga avrik, sum skaffa svimjarum Oyggjaleikapláss.

Hinvegin er tað ein kaldur spurningur um sekund og hundraðpartar.

– Eg hugsaði als ikki um Oyggjaleikirnar, tí so hevði eg ikki verið við í so nógvum kappingum. Tað er strævið at svimja so nógvar kappingar eitt vikuskifti, og tað ávirkar sjálvandi tíðirnar eitt sindur, sigur Karina.

– Eg vildi bara hava so gott úrslit sum gjørligt, og eg eri sera væl nøgd við tað, sum spurdist burtur úr. Tað tóktist sum, at eg skuldi verða vónbrotin, tí eg ikki slapp við til Oyggjaleikirnar, men soleiðis er tað als ikki, sigur Karina.

Maðurin, Jóhannus, er eisini ovurfegin um avrikið hjá konu síni.

– Eg havi ongantíð havt serliga áhuga fyri svimjing, áðrenn eg møtti Karinu, men FM-kappingin var líka spennandi, sum tá GÍ plagdi at vinna fótbóltskappingarnar, sigur Jóhannus.

## Tekur eitt ár afturat

Ætlanin hjá Karinu var at taka eitt svimjiár afturat, men eftir framúr úrslitið í FM-kappingini hevur hon broytt hugsan.

– Í vetur havi eg í grundini bara vunnið mínar bestu tíðir innaftur. Nú kann eg royna at betra meg komandi vetur, og eg ætli mær at verja FM-heitini næsta ár. Tað eru fleiri góðir ungir svimjarar á veg, og tí kann eg rokna við nógv størri kapping næsta ár, sigur Karina Petersen.

– Tað vórðu ov fá føroysk met sligin í ár, men eg ælti mær at gera okkurt við tað næsta ár. Tað er umráðandi, at svimjarar leggja alla orku í at fáa betri tíðir, og at teir royna at betra føroysku metini.

Og Jóhannus er fegin um, at konan ætlar at taka eitt tørn afturat sum svimjari.

– So er bara at vóna, at einki óvæntað kemur uppí...



*Karina Petersen ovast á sigurspallinum. Har stóð hon fimm ferðir undir føroyameistaraskapinum í svimjing. Hon var einasta umboðið hjá Fuglafjarða Svimjifelag, men felagið endaði hóast tað nummar 3 í røðini*
*Mynd: Øssur Mohr*

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Tey komu aftur

**Vinnulívsfólk og politikkarar úr Hanstholm, sum vitjaðu í Føroyum í november í fjør, eru við á fiskivinnumessuni í Runavík. Teirra millum er borgarstjórin**

SAMSKIFTI
*Edvard Joensen*

**Runavík:** Millum framsýnararnar á fiskivinnumessuni í Runavík eru vinnulívsfólk og politikkarar úr Hanstholm í Danmark. Ein teirra, sum er við, er borgarstjórin Aase Jensen, sum eisini var í Føroyum og vitjaði í november mánaða í fjør.

Aase Jensen sigur, at vitjanin seinasta heyst gav so mikið góð sambond til Føroya, at tey ivaðust ikki í at koma aftur til stevnuna, sum nú verður hildin í Runavík.

– Nú hevði Hanstholm væl av sambandi við føroyingar frammanundan, sigur borgarstjórin, men vitjanin seinast gjørdi tað bara upp aftur betri.

Sum dømi nevnir hon, at onkur beinleiðis handilsavtala varð gjørd á teirri ferðini. Til dømis varð avtalað gjørd millum prentsmiðju í Hanstholm og okkurt føroyskt lýsingarblað um prenting í Hanstholm.

Sjálvandi er tað á fiskivinnuøkinum, mesta sambandið millum Hanstholm og føroyingar hevur verið. Men so sanniliga eisini á ferðavinnuøkinum, har Norrøna er berandi kraftin.

Aase Jensen, borgarstjóri í Hanstholm, sigur, at Hanstholm Kommuna arbeiðir í løtuni við útbygging av havnini í Hanstholm, soleiðis at tey millum annað eru til reiðar at taka í móti nýggju Norrønu, tá hon kemur. Borgarstjórin sigur, at tey síggja stórar møguleikar í nýggja skipinum.

Í Hansthom leggja tey stóran dent á at vera tann sonevnda Atlantiska Grindin ella West Link, sum tey nevna tað.

Har er samband úr Noreg, Englandi og Føroyum beinleiðis inn á europeiska meginlandið.

Møguleikarnir at koma úr Hanstholm, sum er ein av teimum stóru fiskivinnuhavnunum í Europa, víðari inn á europeiska marknaðin, eru góðir, sigur Aase Jensen.

Hanstholm marknaðarførir vanliga seg sjálvan sum býin við teirri góðu tænastuni, og tí fara tey at halda fram við. Tey ætla eisini at betra tænastuna í tann mun, tað er gjørligt, sigur borgarstórin. Mottoið er full tænasta 24 tímar um samdøgurðið, sjey dagar um vikuna. Tað er nakað, sum kundarnir skilja og virða, sigur hon.

Donsku havnirnar hava verið almennar fram til nýggjárs. Tá kom nýggj lóggáva, sum ger havnirnar kommunalar, og tað gevur eisini nýggjar avbjóðingar.

Men hesum avbjóðingum hevur Hanstholm lagt upp fyri, og tey ætla avgjørt framvegis at vera millum størstu fiskivinnuhavnir í Europa.

Aase Jensen, borgarstjóri, sigur, at hon er greið yvir, at ikki allar donsku havnirnar fara at klára at yvirliva eftir nýggju lóggávuni.

– Men Hanstholm fer. Ikki bara at yvirliva, men eisini at vaksa, sigur hon avgjørd.

Hetta bjartskygnið byggir hon á teir góðu møguleikarnar fyri útbygging, sum eru í Hanstolm. Nógv pláss er til at byggja á, og útreiðslurnar eru lutvíst lágar í Hanstholm í mun til nógva aðrastøðani.

– Bara eitt ting sum vatn, sigur borgarstjórin, er millum tær vørurnar, sum Hanstholm hevur millum tær bíligastu í Danmark.

Jú, Aase Jensen, borgarstjóri í Hanstholm er sannførd um, at tað loysir seg væl hjá Hanstholm at hava gott samband við føroyingar. Og tað, heldur hon, er eisini galdandi hinvegin.



*John Turka, býráðssskrivari (kommunaldir.) Aase Jensen, borgarstjóri, og Hans Kjær, havnarstjóri, eru millum luttakararnar, sum umboða Hanstholm á fiskivinnumessuni í Runavík*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Eitt model av havnini í Hanstolm, gjørt av Lego klossum, er at síggja á fiskivinnumessuni*
*Mynd: Jensk Kristian Vang*


Scania P93 til sølu



Árg. 1991. Við nýggjari lift. Hevur isoleraðan kassa (Norfig), og er í góðum standi. Møguliga í býti við nýggjari lítlan vøruvogn

Tlf. 314728